

# Vil liva av at syngja

**Edith Dahl Jakobsen er ein av høvuðsleikarunum í sangleikinum FAME, hon stórtrívist í leiklutinum sum Carmen, sum hon heldur líkist sær á fleiri mátar**

FAME
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Edith Dahl Jakobsen gongur í 3.g, hon spælir Carmen, sum er ein av høvuðsleiklutunum í FAME.

Edith er ikki óroynd innan sjónleik og tónleik. Hon hevur spælt sjónleik í 5 ár á Dramaverkstaðnum hjá Hjørdis Johansen, og hon hevur eisini sungið í fleiri ár.

- Carmen er tann typan, sum heldur seg vera betri enn øll hini. Hon vil gjarna koma langt. Hon heldur ikki at hon hevur brúk fyri skúlanum, hon vil bara leypa tað um, og koma beint til stjørnudreymarnar, sigur Edith um sín leiklut.

Edith heldur tó at leikluturin Carmen líkist henni uppá fleiri mátar.

- Henni dámar væl at upptraðka og hon vil gjarna brúka síni evni til okkurt. Í so máta haldi eg, at tað er lætt at seta seg í hennara stað, tí mær dámar eisini væl at syngja, og kundi væl hugsað mær at liva av tí, tá eg verið eldri. Eg havi eisini fame-dreymarnar, men sálarliga er Carmen nógv øðrvísi enn eg, og hennara bakgrund er ein heilt onnur, enn tað sum eg kenni til, so tað má eg seta meg inn í, fyri at fáa rætta lyndið fram.

Umleið 140 fólk vóru til upptøkuroynd til leikin, har øll skuldu dansa, syngja og spæla sjónleik.

- Vit, sum sluppu við, vóru øgiliga heppin. Eg rokni við at nakað, tey hava lagt merki til, er, at leikararnir útstrála sjálvsálit og at tey ikki eru smæðin.

Edith dámar sera væl at vera við í leikinum, og heldur tað ikki vera strævið at venja so nógv.

- Tá vit eru saman hava vit tað so ræðuliga stuttligt. Tá eg komi í skúla er tað fyrsta sum eg hugsi, "Eg gleði meg at venja FAME aftaná skúlatíð."

Hon heldur eisini, at hon hevur ment seg nógv sum leikara og hevur lært nógv, síðan síðst í august tá tey byrjaðu at venja sangleikin.

Hóast tey nýta nógva tíð at venja, heldur Edith ikki, at tað gongur út yvir skúlagongdina.

- Tað krevur sjálvdissiplin at fáa tað at hanga saman. Man er noyddur at siga nei til alt annað enn skúlan og FAME. So ber tað eisini til at fáa bæði tingini at ganga upp.

Edith gleðir seg sera nógv til at skula framføra leikin.

- Vit eru verri enn so komin á mál enn, tað eru nógvar detaljur, sum eru eftir at fáa upp á pláss. Men um tað var upp til mín, so framførdu vit í morgin.



*Edith Dahl Jakobsen*

Leikstjórin:

# Dámar einki, at tað er útselt

**Jákup Veyhe er leikstjóri í sangleikinum FAME. Hann er væl nøgdur við, hvussu tað gongur við venjingunum**

FAME
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

- Leikurin er við at taka form. Leikararnir hava gjørt stór framstig, serliga innanfyri sangin. Eg haldi sjálvur, at tey syngja ordiliga gott, tey eru fyri ein stóran part vald út eftir, at tey duga at syngja.

Nú tíðin til frumframførsluna styttist nýta tey venjingarnar at spæla senurnar ígjøgnum, men tað legst alla tíðina meira afturat.

- Teksturin hevur sitið í umleið tríggjar vikur. Dansurin er nøkulunda gjørdur, men har kemur meira koreografi í síðstu løtu. Nú eru tað búnar, sum koma. Orkestrið er akkurát byrjað at koma afturat, og síðan koma blásarar og kórið.

- Higartil hava øll vant fyri seg, har kapellmeistarin hevur verið sambindingin. Tað er sum ein lagkøka, har tað koma fleiri og fleiri løg. Hóskvøldið skulu øll venja saman fyri fyrstu ferð, greiðir Jákup Veyhe frá.

6. november fara pallsmiðirnir inn í Norðurlandahúsið, og 10. november sleppa leikararnir inn, har tey skulu venja seg við at brúka pallin, samstundis við at restin av dansinum skal fáast upp á pláss.

Enn eru tvær vikur til frumsýningina og allar tær sýningarnar ið stóðu á skránni, umframt tvær eykasýningar, eru longu útseldar. Bert nøkur fá atgongumerki eru eftir til tær síðstu fýra eykasýningarnar og fleiri sýningar vera ikki gjørdar.

- Mær dámar einki at tað longu er útselt, sigur leikstjórin og greiðir frá:

- Tað setur vónirnar so nógv upp, at mær hevði dámt betur, um tað bleiv selt eftir fyrstu sýningina, tí so var tað eitt rykti. Men eg skilji tað væl, tí Fame er eitt gott navn. Seinast studentaskúlin framførdi ein leik, var eisini gravgangur eftir atgongumerkjum eftir frumframførsluna. Tað er kanska tí, at fólk vilja tryggja sær atgongumerki, sigur Jákup Veyhe.



*Jákup Veyhe leikstjórnar FAME*

## FAKTA

Søgugongdin í sangleikinum er vorðin eitt sindur føroyskað. FAME er stytt fyri Føroya Altjóða Miðnámsskúli fyri Evnarík listafólk. Tað ein listaskúli, sum er í Føroyum, við altjóða næmingum og lærarum.

Leikurin er umsettur úr leikritinum til enska leikin, sum er grundað á filmin frá 1980 og sjónvarpsrøðina frá 1982, við saman navni.

Leiklutirnir eru teir, sum eru kendir frá sjónvarpsrøðini, men tey eita onnur nøvn.

Vit fylgja átta næmingum, sum sleppa ígjøgnum upptøkuroyndina inn á skúlan. Skúlin varar í 3 ár og vit uppliva nakrar av teimum avbjóðingum, næmingarnir verða útsettir fyri.

Høvuðsavbjóðingin er, at ein næmingur vil vera kendur sjónleikari og blívur lokkað av einum fotografi at fara til New York fyri at blíva kend.

Ein annar høvuðsleikari er serstakliga góður dansari, men er illa fyri bókliga og liggur á markinum til at blíva blakaður út.

Og so eru eisini nakrar kærleikssøgur inn í millum.